BARNAVERNDARSTOVA FØROYA

Dygdarhandbók

- leiðreglur fyri arbeiðið í Barnahúsinum

mars 2016

”Dygdarhandbókin er eitt felags fakligt amboð hjá Barnahúsinum og teimum, ið luttaka í samstarvinum har. Endamálið við hesi handbók er at lýsa serligu førleikarnar, ið skulu til, tá ið mál um ágang móti børnum ella ungum verða viðgjørd. Leiðreglurnar skulu seta sín dám á tilgongdina í slíkum málum kring alt landið og skulu stuðla undir, at Barnahúsið virkar eftir einum dygdargóðum og serkønum leisti, sum er í støðugari menning.”

Innihaldsyvirlit

1. Inngangur 2
2. Barnahúsleisturin 3
3. Endamál 4
4. Lógargrundarlag 5
5. Málbólkur og málsøki 6
6. Í minsta lagi tveir samstarvspartar 7
7. Mál um revsiverd viðurskifti 8
8. Mál, har ung yvir 14 ár kunnu avhoyrast við videoútgerð 9
9. Avhoyring av ungum yvir 14 ár 10
10. Harðskapsmál 11
11. Foreldur ella avvarðandi hjá barninum ella ungfólkinum 12
12. Málsviðgerar innan barnaverndartænasturnar 13
13. Mál, ið ikki koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum 14
14. Innrættingin av Barnahúsinum 15
15. Starvsfólkið í Barnahúsinum 16
16. Málsgongdir og virksemi annars í Barnahúsinum 17
17. Stig í málsgongdini 19
1) Ráðgevandi stigið 19
2) Byrjanar- og fyrireikingarstigið 19
3) Greiningar-, greiðingar- og kanningarstigið 21
4) Eftirkanningarstigið 23
18. Málsgongdir í bráðfeingis málum 24
19. Skrivligar mannagongdir 25
20. Tvørfakliga samstarvið 26
21. Samstarvsavtalur og leiðreglur 27
22. Førleikamenning í Barnahúsinum 28
23. Dátuskráseting og skjalfesting 29

1. Inngangur

Barnahúsið fevnir um eitt samskipað samstarv, ið røkkur tvørtur um fleiri starvs- og fakøki, og sum tryggjar, at mál um kynsligan ágang og annan harðskap ímóti børnum og ungum verða viðgjørd í einum barnavinarligum umhvørvi, har barnið ella ungfólkið er í miðdeplinum.

Dygdarhandbókin er eitt felags fakligt amboð hjá Barnahúsinum og teimum, ið luttaka í samstarvinum har. Endamálið við hesi handbók er at lýsa serligu førleikarnar, ið skulu til, tá ið mál um ágang móti børnum ella ungum verða viðgjørd. Leiðreglurnar í handbókini skulu seta sín dám á tilgongdina kring alt landið og skulu stuðla undir, at Barnahúsið virkar eftir einum dygdargóðum og serkønum leisti, sum er í støðugari menning.

Hesar leiðreglur taka støði í lógarásetingunum um Barnahúsið. Leiðreglurnar lýsa harumframt fleiri vegleiðandi mannagongdir í arbeiðinum hjá Barnahúsinum, bæði tá ið tað snýr seg um ítøkilig mál, sum Barnahúsið hevur um hendi, og tá ið talan er um ráðgevandi stuðulin, sum Barnahúsið veitir barnaverndartænastunum kring landið, har mál um ágang taka seg upp.

Mál um ágang kunnu vera sera ymisk, og børn og ung, ið hava verið fyri ágangi, kunnu hava nógvar ymiskar trupulleikar og ymiskan tørv. Tá ið avgerð verður tikin um, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk, skal tískil metast nágreiniliga og ítøkiliga um hvørt einstakt mál sær í Barnahúsinum.

Felags vitanin hjá Barnahúsinum um hvørt einstakt barn ella ungfólk skal bæði taka støði í viðurskiftunum í hvørjum einstøkum føri og í eini heildarmynd, ið er barnavinarlig og røkkur tvørtur um fakmark. Hetta verður gjørt fyri, at málsgongdin kann verða fyriskipað á ein hátt, ið tekur mest gjørligt fyrilit fyri einstaka barninum ella ungfólkinum.

Handbókin lýsir fyrst ætlanirnar og endamálið við Barnahúsinum. Lýst verður síðani, hvønn málbólk Barnahúsið vendir sær til, hvat málsøkið hjá húsinum er, hvussu stovnurin er samansettur, og hvørji starvsfólk arbeiða í Barnahúsinum. Greitt verður frá, nær barnaverndartænasturnar hava møguleika – og skyldu - til at heita á Barnahúsið/Barnaverndarstovuna um hjálp við viðgerð av einum ávísum máli. Síðani verður lýst, hvussu mál verða viðgjørd í Barnahúsinum, og hvussu arbeitt verður víðari við málum, har talan er um ágang. Harumframt verða vegleiðandi mannagongdir hjá Barnahúsinum í sambandi við mál um ágang lýstar, umframt krøvini til samstarvsavtalurnar, sum eru galdandi fyri Barnahúsið. At enda verða leiðreglurnar um førleikakrøv til starvsfólk í Barnahúsinum lýstar, umframt tey krøv, ið eru um dátuskráseting og skjalfesting av virkseminum í Barnahúsinum.

2. Barnahúsleisturin

Barnahúsið tekur støði í norðurlendska barnahúsleistinum, sum byggir á samstarv tvørtur um kommunu- og fakmørk. Barnahúsið skal veita ráðgeving í sambandi við barnafakligu kanningini í málum, har illgruni ella vissa er um, at eitt barn ella ungfólk undir 18 ár hevur verið fyri ágangi, og har tað er neyðugt at taka løgregluna ella sjúkrahúsverkið uppí málið. Avvarðandi barnaverndartænasta hevur myndugleikaábyrgdina, meðan málið verður viðgjørt í Barnahúsinum.

Barnahúsið er mannað við føstum serútbúnum starvsfólkum, ið hava serkunnleika at taka sær av málum um ágang ímóti børnum og ungum. Harumframt kann Barnahúsið heita á serkøn fólk frá eitt nú løgregluni og sjúkrahúsverkinum eftir tørvi.

Barnahúsið er eitt barnavinarligt innrættað hús, har myndugleikar kunnu savnast, soleiðis at eitt barn ella ungfólk, ið hevur verið fyri ágangi, ella har illgruni er um hetta, kann kannast, greinast og fáa kreppuhjálp saman við teimum avvarðandi.

Ein grundhugsan í barnahúsleistinum er, at avvarðandi myndugleikar møta barninum ella tí unga í Barnahúsinum, og at teir, so frægt sum til ber, gera sítt arbeiði inni í Barnahúsinum. Felags serkunnleikin skal tryggja, at arbeiðið við hvørjum einstøkum barni ella ungfólki verður gjørt við støði í eini heildarmynd, ið er barnavinarlig og røkkur tvørtur um arbeiðsmark hjá teimum, ið kanna málið. Hetta verður gjørt við tí endamáli, at hvør einstøk málsgongd kann verða fyriskipað á ein hátt, ið tekur mest gjørligt fyrilit fyri hvørjum barni ella ungfólki.

3. Endamál

Høvuðsendamálið við Barnahúsinum er at tryggja dygdargott, væl skipað og umhugsið tvørfakligt arbeiði við børnum og ungum – umframt familju ella avvarðandi annars – í málum um ágang. Eisini skal Barnahúsið tryggja, at mál um kynsligan ágang ella annan harðskap fáa somu dygdargóðu viðgerð kring alt landið.

Endamálið við at savna serkønu, tvørfakligu og samskipaðu viðgerðina av málum um ágang ímóti børnum ella ungum saman í Barnahúsinum er, at barnið ella ungfólkið fær betri umstøður at verða væl kannað og umstøður at koma fyri seg eftir ágangin.

4. Lógargrundarlag

Í § 10 a í dagførdu lógini um barnavernd frá 18. desember 2013 verður ásett, at Barnahúsið virkar sum karmur um tvørfakligt samstarv, tá børn undir 18 ár hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, ella tá illgruni er um, at hesi eru ella hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.

Sambært lógarbroytingini kunnu løgregla, ákæruvald, sosialir myndugleikar, heilsumyndugleikar, løggild heilsustarvsfólk og starvsfólk í Barnahúsinum í sambandi við málsviðgerð lata upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá barninum og familjuni ímillum sín, tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan.

5. Málbólkur og málsøki

Málbólkurin hjá Barnahúsinum er:

Børn og ung í aldursbólkinum undir 18 ár, ið hava verið fyri ágangi – her í millum kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi – ella í teimum førum, tá illgruni er um slíkan ágang.

Nærmastu avvarðandi kunnu fáa kreppuhjálp við tí endamáli, at tey verða betri før fyri at handfara støðuna hjá barninum ella ungfólkinum og veita teimum umsorgan.

Barnahúsið/Barnaverndarstovan veitir harumframt ráðgevandi stuðul til barnaverndartænastur, ið hava ítøkilig mál um hendi, har illgruni ella vissa er um kynsligan ágang ella annan harðskap. Eisini fæst ráðgeving í málum, har varhugi er um ágang.

Barnahúsið skal nýtast í málum um ágang, tá 1) barnaverndartænastan við støði í illgruna ella vissu um ágang móti einum barni ella ungfólki undir 18 ár skal fremja eina barnafakliga kanning sambært § 45 í barnaverndarlógini ella eina ískoytiskanning av viðurskiftunum hjá barninum ella ungfólkinum, og 2) tá neyðugt er við tvørfakligum samstarvi (millum barnaverndartænastuna, løgregluna og/ella sjúkrahúsverkið). Talan kann bæði vera um hendingar, ið júst eru farnar fram og um viðurskifti, ið liggja longur afturí tíð, men sum nústani eru komin undan kavi.

6. Í minsta lagi tveir samstarvspartar

Mál, sum byrja í Barnahúsinum, skulu sum meginreglu fevna um ágang, ið krevur tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastu, løgreglu og/ella sjúkrahúsverk. Tískil skal tað – umframt barnaverndartænastuna – altíð vera í minsta lagi ein annar samstarvspartur við í viðgerðini av málinum.

Eftir hesi meginreglu skal Barnahúsið ikki skal nýtast í málum, um løgreglan og/ella sjúkrahúsverkið ikki er við í viðgerðini. Hugast kann til dømis eitt mál, har barnaverndartænastan hevur fingið fráboðan um tvey fýra og fimm ára gomul børn, sum á einum dagstovni eru farin út um mark í læknaspæli. Í hesum máli skal barnaverndartænastan eftir ráðum frá Barnaverndarstovuni og við støði í frágreiðingini taka støðu til, um tað er hóskandi at gera eina barnafakliga kanning av tí eina barninum, tí hetta barnið verður hildið at hava veik mørk og hevur fleiri ferðir verið út fyri, at spøl við øðrum børnum á stovninum eru farin út um mark. Annað foreldrið at barninum líður av og á av sálarligari sjúku, og neyðugt er at fáa greiðu á, um barnið hevur tørv á serligum stuðli.

Harumframt eigur ein námsfrøðilig fyriskipan, ið tekur støði í tilbúgvingini, sum skal byrgja fyri ágangi ímóti børnum, at verða umhugsað á dagstovninum (sí s. 8 í *Útflýggjan av sínámillum upplýsingum í málum um kynsligan ágang og annan harðskap móti børnum og ungum - ein leiðbeining).*

7. Mál um revsiverd viðurskifti

Sum grundregla snúgva tey mál, sum koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum, seg um illgruna um revsiverd viðurskifti, ella um viðurskifti, har neyðugt er við tvørfakligum samstarvi um málið. Hetta er galdandi uttan mun til, um ágangurin ímóti barninum ella tí unga júst er framdur, ella um hann varð framdur fyrr í lívinum hjá viðkomandi.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at løgreglan kann dragast inn í mál, ið snúgva seg um eitt barn ella ungfólk, sum hevur verið fyri ágangi frá einum øðrum barni ella ungfólki, sum er yngri enn 15 ára revsialdurin, hóast talan í hesum føri ikki er um revsimál. Løgreglan kann til dømis skráseta upplýsingar um eitt mál, ið er framt av einum 13 ára gomlum. Í álvarsligum málum kann løgreglan taka avgerð um at avhoyra eitt barn ella ungfólk, sum hevur verið fyri ágangi, ið annað barn ella ungfólk undir 15 ár hevur framt, við videoútgerð. Hetta kann tó ikki vera ein videoavhoyring eftir løgfrøðiligum reglum, tí hvørki ákæri ella verji eru til staðar.

Slík videoavhoyring kann til dømis verða gjørd í einum máli um systkinablóðskemd, har ein ein 14 ára gamal drongur í fleiri ár hevur framt ágang móti átta ára gomlu systir síni. Harafturat kann tað eisini verða neyðugt at boða løgregluni frá um mál, ið kunnu føra til rættarmál um endurgjald. Í slíkum førum kann tað verða viðkomandi at melda málið, hóast ágangurin varð framdur av einum persóni undir 15 ár.

8. Mál, har ung yvir 14 ár kunnu avhoyrast við videoútgerð

Sambært rættargangslógini kunnu bert børn, ið eru 14 ár ella yngri, verða videoavhoyrd í Barnahúsinum. Í serligum umstøðum ber tó til at víkja frá hesum aldursmarki við støði í búningarstøðinum og sálarligu støðuni hjá barninum ella ungfólkinum.

Undantak kann til dømis verða viðkomandi, um ein ungur persónur, ið er eldri enn 14 ár, er menningartarnaður.

9. Avhoyring av ungum yvir 14 ár

Í ávísum førum, um tað er gjørligt og verður mett hóskandi, kann løgreglan eisini velja at avhoyra ung yvir 14 ár, sum skulu fyri rættin, inni í Barnahúsinum sambært samstarvsavtalu millum Barnaverndarstovu Føroya og Føroya Landfúta.

Í ítøkiligum málum ber eisini til at meta um, í hvønn mun avhoyring í Barnahúsinum nøktar tørvin hjá viðkomandi best, ella um eitt annað stað hevði verið meira hóskandi (so sum heimið, skúlin, løgreglustøðin ella annar stovnur). Avgerð um hetta verður tikin í samráði millum løgregluna, barnaverndartænastuna og Barnahúsið.

10. Harðskapsmál

Sum útgangsstøði skal Barnahúsið nýtast í harðskapsmálum, tá ið eitt barn ella ungfólk hevur verið fyri harðskapi, ið er framdur av fólki í nærumhvørvinum hjá viðkomandi.

Hetta kann til dømis vera, um annað ella bæði foreldrini/stjúkforeldrini ella onnur í nærumhvørvinum fremja harðskap ímóti barninum ella ungfólkinum. Nærumhvørvið er tó ikki avmarkað til familju, men kann til dømis eisini fevna um persónar á stovnum, har barnið ella ungfólkið heldur til.

Barnaverndartænastan vendir sær til Barnahúsið/Barnaverndarstovuna, fyri at finna fram til, hvussu farið verður fram, tá vissa ella illgruni er um harðskap, her í millum at seta í verk eina barnafakliga kanning ella ískoyti til eina slíka kanning, og í hvønn mun løgregla ella heilsumyndugleikar skulu dragast inn í málið.

Harumframt kann barnaverndartænastan taka avgerð um at nýta Barnahúsið í málum um børn og ung, sum hava upplivað harðskap ímillum foreldur/stjúkforeldur ella ímóti systkjum, um mett verður, at tørvur er á barnafakligari kanning, og um løgreglan samstundis ynskir at avhoyra barnið ella ungfólkið sum vitni.

11. Foreldur ella avvarðandi hjá barninum ella ungfólkinum

Foreldur ella onnur avvarðandi hjá einum barni ella ungfólki, ið hevur verið fyri ágangi, ella har illgruni er um ágang, koma eisini undir málbólkin hjá Barnahúsinum. Hetta kann til dømis gera seg galdandi, um eitt barn ella ein ungfólk hevur verið fyri ágangi, ið er framdur av einum øðrum persóni enn foreldrunum ella teimum avvarðandi, og starvsfólkið í Barnahúsinum metir, at eisini foreldur ella avvarðandi hava tørv á kreppuhjálp til tess at handfara støðuna hjá barninum ella ungfólkinum og veita tí so nógvan stuðul, sum til ber.

Í teimum førum, har annað av foreldrunum ella stjúkforeldrunum at barninum ella tí unga hevur framt ágangin, ella illgruni er um hetta, er tað sum meginregla tað foreldrið, ið ikki hevur framt ágangin, sum fær bjóðað kreppuhjálp í Barnahúsinum.

12. Málsviðgerar innan barnaverndartænasturnar

Starvsfólk innan barnaverndartænasturnar, ið viðgera mál um ágang (ella illgruna um ágang) kunnu fáa ráðgevandi stuðul í Barnahúsinum, um gjørt verður av at fara undir eina barnafakliga kanning ella – í teimum førum hetta er viðkomandi – eina ískoytiskanning, og viðgerðin krevur samstarv millum løgregluna og/ella sjúkrahúsverkið.

Harumframt veitir Barnahúsið/Barnaverndarstovan ráðgevandi stuðul til barnaverndartænasturnar í málum, har varhugi er um ágang ímóti einum barni ella ungfólki, og har ivi er um, hvørt talan er um eitt mál, sum kemur undir málsøkið hjá Barnahúsinum.

Onnur fakfólk, so sum lærarar, námsfrøðingar og heilsufrøðingar, skulu leita sær leiðbeining frá tilbúgvingarskipanini, sum kommunurnar eiga at hava viðvíkjandi fyribyrging, eftirkannan og handfaring av málum, har illgruni er um ágang.

13. Mál, ið ikki koma undir málsøkið hjá Barnahúsinum

Hesi mál koma sum meginregla ikki undir málsøkið hjá Barnahúsinum:

- Mál um harðskap millum javnaldrar, har í millum harðskapur, sum hendir í náttarlívinum
- Mál um neyðtøku av ungfólki undir 18 ár, um mett verður, at tørvur ikki er á barnafakligari kanning
- Børn og ung, ið kynsliga fara um mark ella vísa harðligan atburð mótvegis øðrum børnum og ungum – heldur ikki í teimum førum, har barnið ella tann ungi er undir revsialdur (ongin rættarsókn). Tó kann Barnahúsið verða brúkt í málum, ið snúgva seg um eitt barn ella ungfólk, ið hevur gjørt seg inn á eitt annað barn ella ungfólk, um vissa ella illgruni er um, at barnið sjálvt hevur verið fyri ágangi
- Menningartarnað yvir 18 ár, ið hava verið fyri ágangi. Barnahúsið kann tó av sínum eintingum gera avtalu við løgregluna um nýtslu av avhoyringar-hølunum hjá Barnahúsinum í slíkum málum. Tó skulu høvuðsuppgávurnar hjá Barnahúsinum altíð raðfestast hægst og mugu ikki ávirkast av málum, ið koma undir omanfyri nevnda bólk

14. Innrættingin av Barnahúsinum

Barnahúsið er innrættað við tí fyri eyga, at umhvørvið skal vera so barna- og ungdómsvinarligt sum gjørligt, so at barnið ella ungfólkið kann uppliva húsið sum eitt trygt stað. Barnahúsið skal eisini lúka treytirnar um atkomumøguleikar fyri fólk, ið bera brek.

Innrættingin skal hóska til tær arbeiðsuppgávur, sum Barnahúsið tekur sær av. Millum annað skulu umstøðurnar til videoavhoyring lúka treytirnar, ið ákæruvaldið hevur ásett og hølini skulu verða tryggjað sambært ávísingum frá løgregluni.

Barnahúsið hevur teir hentleikar, ið eru neyðugir fyri at gera samrøður, kanningar o.a. av barninum ella tí unga. Innrættingin av Barnahúsinum skal millum annað hóska til fylgjandi virksemi:

- Móttøka av barninum ella ungfólkinum og avvarðandi
- Videoavhoyring (við tilhoyrandi lurtirúmi)
- Kreppuhjálp og –viðgerð av børnum ella ungum og teirra avvarðandi
- Fundarvirksemi
- Skrivstovuarbeiði
- Køkshentleikar
- Vesi og baðihentleikar

15. Starvsfólkið í Barnahúsinum

Barnahúsið hevur eitt fast starvsfólkatoymi, ið er serútbúgvið og serliga skikkað at taka sær av málum um ágang ímóti børnum.

Fasta starvsfólkatoymið hevur ábyrgd av eitt nú leiðslu, sosialráðgeving, sálarligum stuðli og skrivstovuarbeiði. Harafturat arbeiðir toymið í felag við ávísar uttanhýsis samstarvspartar, ið, eftir tørvi, kunnu verða boðsendir at hjálpa við ítøkiligum málum í Barnahúsinum. Samstarvspartarnir eru sum oftast løgreglufólk, barnalæknar og aðrir læknar. Harafturat luttaka sálarfrøðingar, ið hoyra til viðgerðartoymið, eftir tørvi.

Eisini kann Barnahúsið eftir tørvi heita á onnur serkøn fólk, tá hetta er neyðugt, til dømis ein tulk, ein málsviðgera frá Ríkisumboðnum ella ein serfrøðing innan eitt ávíst brek hjá barninum ella ungfólkinum.

Harumframt verða boð altíð send eftir málsviðgeranum í avvarðandi barnaverndar-tænastu, ið fylgir barninum ella tí unga í Barnahúsinum, og sum luttekur í málsgongdini. Í viðgerðini av ítøkiliga málinum virkar hesin málsviðgerin sostatt sum partur av toyminum í Barnahúsinum.

Um starvsfólkið í Barnahúsinum metir, at barnið ella ungfólkið sum liður í kreppuhjálpini frá Barnahúsinum til dømis hevur tørv á fleiri samrøðum við sálarfrøðing, eru tað sum oftast foreldrini ella onnur avvarðandi, ið fara við barninum ella ungfólkinum til sálarfrøðing. Málsviðgerin skal tó eisini í teimum førunum tryggja sær at fáa hendur á upplýsingum frá samrøðunum, ið kunnu verða viðkomandi fyri málið. Hetta verður millum annað gjørt við tað, at málsviðgerin luttekur í endaliga samráðnum í málinum.

16. Málsgongdir og virksemi annars í Barnahúsinum

Barnahúsið setur barnið ella ungfólkið í miðdepilin í øllum sínum virksemi og gjøgnum alla málsgongdina. Hetta merkir, at alt arbeiðið skal fyriskipast so varliga sum gjørligt, og at barnið ella ungfólkið alla tíðina verður kunnað um, hvat fer at henda. Hetta merkir eisini, at greiningar og kanningar skulu setast í verk skjótast til ber, í tann mun hetta hóskar til hvørt einstakt mál og serstøku viðurskiftini í hesum sambandi.

Arbeiðið hjá Barnahúsinum snýr seg um at hjálpa málsviðgeranum hjá avvarðandi barnaverndartænastu at fáa greiðu á viðurskiftunum hjá barninum ella ungfólkinum. Hetta fyri at finna fram til, í hvønn mun barnið ella tann ungi hevur tørv á serkønari hjálp, tá vissa ella illgruni er um, at hann/hon hevur verið fyri ágangi. Neyðugu greiningarnar og kanningarnar verða gjørdar sum liður í barnafakligu kanningini, ið er lýst í § 45 í Barnaverndarlógini. Av tí, at Barnahúsið í sínum greiningum og kanningum leggur høvuðsdentin á viðurskiftini hjá barninum ella ungfólkinum, ið hava við ágangin ella illgrunan um ágangin at gera, skal málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni eisini gera eina fullfíggjaða barnafakliga heildarkanning sambært áðurnevndi § 45. Heildarkanningin verður í slíkum føri gjørd sum liður í málsgongdini í Barnahúsinum. Upplýsingar um viðurskiftini hjá barninum ella tí unga, sum koma fram undir kanningunum í Barnahúsinum, skulu takast við í heildarmetingina av, í hvønn mun barnið ella tann ungi hevur tørv á serkønari hjálp.

Um barnafaklig kanning longu er gjørd, skal Barnaverndartænastan í staðin fyri gera eina ískoytiskanning afturat henni, sum er gjørd fyrr. Tá ið slík kanning verður gjørd, skal Barnaverndartænastan vera varug við, at viðkomandi skjøl verða send til Barnahúsið í sambandi við kanningina.

Harumframt luttekur heilsurøktarfrøðiligt starvsfólk í samráðum og samrøðum í Barnahúsinum. Hetta starvsfólk skal eisini meta um, í hvønn mun tørvur er á viðgerðum, og um tørvur er á framhaldandi tørvskanning av barninum ella ungfólkinum.

Løgreglan nýtir eisini Barnahúsið til videoahoyring av børnum ella ungum í sambandi við eina ítøkiliga rannsókn. Hetta verður gjørt sambært leiðreglunum, sum eru ásettar í: Meddelelse - RM 2 - 2007 (http://www.krim.dk/undersider/straffesager/straffeproces/872-videoafhoering-boern-bevis-formkrav-mv-ra-2-2007.pdf

Løgreglan kann eisini velja at nýta Barnahúsið til avhoyring av børnum ella ungfólkum yvir 14 ár, sum ikki skulu videoavhoyrast. Løgreglan luttekur í slíkum førum eisini í viðkomandi samráðum í Barnahúsinum.

Um løgreglan metir, at grundarlag er fyri tí, kann hon harumframt biðja um læknakanning. Mannagongdirnar í Barnahúsinum í sambandi við læknakanningar eru ásettar í samstarvsavtalu millum Barnaverndarstovu Føroya og Landssjúkrahúsið viðvíkjandi Barnahúsinum.

Tá ið ein videoavhoyring verður gjørd (í ávísum førum saman við eini læknakanning), kunnu teir ymisku myndugleikarnir, ið luttaka í málsgongdini – sambært avtalu við løgregluna – greina, greiða og kanna, í hvønn mun barnið ella tann ungi skal fáa psykososialan stuðul og (um tørvur er á tí) kreppuviðgerð. Harafturat kunnu foreldrini ella avvarðandi hjá barninum ella ungfólkinum fáa bjóðað kreppuhjálp og –viðgerð, um hetta verður mett hóskandi. Innleiðandi kreppuhjálpin kann sambært avtalu við løgregluna byrja, áðrenn avhoyringin byrjar. Føst starvsfólk í Barnahúsinum ella sálarfrøðingar, ið hoyra til viðgerðartoymið, veita kreppuhjálpina.

Starvsfólk í Barnahúsinum veita barnaverndartænastunum ráðgeving og vegleiðing, tá tað snýr seg um at greina, greiða og kanna tørvin sum heild hjá eini familju, ið er ávirkað av ágangi. Mett verður um hetta sambært ásetingunum í Barnaverndarlógini. Málsviðgerin í avvarðandi barnaverndartænastu hevur gjøgnum alla málsgongdina í Barnahúsinum myndugleikaábyrgd av barninum ella ungfólkinum, og tað er altíð barnaverndartænastan, ið tekur støðu til fyriskipanir, ið ávirka barnið ella tann unga, meðan kanningin í Barnahúsinum fer fram.

17. Stig í málsgongdini

Málsgongdin í Barnahúsinum kann býtast sundur í fýra høvuðsstig:

> *Ráðgevandi stigið >> Byrjanar- og fyrireikingarstigið >> Greiningar-, greiðingar- og kanningarstigið >> Eftirkanningarstigið*

Av tí at mál, ið Barnahúsið hevur um hendi, eru sera ymisk, kann stórur munur vera ímillum ymisk mál, tá tað snýr seg um innihaldið og longdina av teimum ymisku stigunum, og tá tað kemur til málsgongdina í Barnahúsinum sum heild.

Niðanfyri er ein neyvari frágreiðing av ymiska virkseminum, sum Barnahúsið kann seta í verk í teim ymisku stigunum.

1) Ráðgevandi stigið

Um tað bert er veikur illgruni um ágang, og um ivasamt er, í hvønn mun tað er hóskandi at kanna barnið ella tann unga í Barnahúsinum, kann málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni seta seg í samband við Barnahúsið/Barnaverndarstovuna og meta um málið, og – um tørvur er á tí – í samráð við uttanhýsis samstarvspartar. Barnahúsið/Barnaverndarstovan veitir ráðgeving og vegleiðing um, hvørt málið hoyrir til málsøkið hjá Barnahúsinum ella ei.

Á ráðgevandi stiginum (áðrenn tað er vorðið greitt, um málið skal viðgerast í Barnahúsinum) veitir Barnahúsið/Barnaverndarstovan serfrøðiliga ráðgeving ígjøgnum telefon. Í serliga torførum og ivasomum málum, ið ikki kunnu avgreiðast við telefonráðgeving, kann barnaverndartænastan biðja um, at málið verður tikið upp í einum samráði í Barnahúsinum.

Onnur viðkomandi fakfólk, so sum lærarar, námsfrøðingar ella heilsufrøðingar, ið bera illgruna um ágang, skulu leita sær hjálp frá avvarðandi barnaverndartænastu.

Ráðgevandi stuðul verður ikki veitt til vanligar borgarar. Um eitt barn ella ungfólk, ella foreldur ringja til Barnahúsið at fáa telefonráðgeving, skal Barnahúsið hjálpa tí, sum ringir, at fáa samband avvarðandi barnaverndartænastu, ið kann veita ráðgeving.

2) Byrjanar- og fyrireikingarstigið

Ein málsgongd kann byrja ávikavist hjá barnaverndatænastuni, hjá løgregluni ella í sjúkrahúsverkinum, men tað er barnaverndartænastan, ið ger av, í hvønn mun Barnahúsið skal verða nýtt í einum ávísum máli.

Harumframt kunnu mál í Barnahúsinum verða viðgjørd eftir tveimum ymiskum fortreytum: sum eitt fyrireikað mál ella sum eitt bráðfeingis mál. Her veldst um um innihaldið og skundin, ið málið hevur. Er ágangurin til dømis júst uppdagaður ella

framdur, og rannsóknin krevur, at avhoyring og læknakanning av barninum ella tí unga verður gjørd skjótast gjørligt, so kann málið verða viðgjørt bráðfeingis. Bráðfeingismál krevja skjóta meting og møguliga bráðfeingis avgerðir, eitt nú fyri at verja barnið ella ungfólkið, ella veita sjúkraviðgerð (sí partin um málsgongdir í bráðfeingis málum).

Niðanfyri verða málsgongdirnar lýstar fyri mál, ið byrja ávikavist hjá barnaverndartænastuni, hjá løgregluni og í sjúkrahúsverkinum.

Mál, sum byrja hjá barnaverndartænastuni
Barnaverndartænasturnar kunnu fáa upplýsingar ella illgruna um, at eitt barn ella ein ungur hevur verið fyri ágangi, antin ígjøgnum eina áheitan frá barninum ella ungfólkinum sjálvum ella frá øðrum persóni. Eisini kunnu barnaverndartænasturnar fáa vissu ella illgruna um ágang, tá ein barnafaklig kanning verður gjørd.

Í fyrstu syftu metir barnaverndartænastan sjálv, um málið skal meldast til løgregluna. Í hesum sambandi kann barnaverndartænastan heita á løgregluna at fáa meting um hetta, og hon setur seg eisini í samband við Barnahúsið/Barnaverndarstovuna fyri at fáa ráðgevandi stuðul. Tá støða verður tikin um, hvørt tørvur er á at nýta Barnahúsið til at kanna viðurskiftini hjá einum barni ella ungfólki, setur barnaverndartænastan seg í samband við Barnahúsið fyri at geva upplýsingar um komandi málið og fyri at fáa ráðgeving og vegleiðing um, hvussu málið skal handfarast, áðrenn tað kemur til Barnahúsið. Á hesum innleiðandi stigi kann vegleiðingin eitt nú snúgva seg um, í hvønn mun foreldur ella onnur avvarðandi skulu koma við barninum ella tí unga til Barnahúsið og fylgja gongdini, og um barninum ella tí unga tørvar bráðfeingis tiltøk sambært ásetingunum í Barnaverndarlógini. Hetta ger seg serliga galdandi í teimum førunum, tá ið ágangurin er framdur av foreldrum ella øðrum avvarðandi, og tá tað tí kann gerast neyðugt at taka barnið ella ungfólkið úr heiminum alt fyri eitt.

Málsviðgerin í barnaverndartænastuni fylgir barninum ella ungfólkinum undir málsgongdini í Barnahúsinum og fær ráðgeving og vegleiðing um handfaringina av ítøkiligum málum. Sum meginregla er málsviðgerin við barninum, tá ið tað skal greinast, greiðast og kannast í Barnahúsinum. Um starvsfólk í Barnahúsinum metir, at barnið hevur tørv á enn fleiri samrøðum við sálarfrøðing, og at tað tískil skal vitja Barnahúsið eftir sjálva málsviðgerðina, eru tað sum oftast foreldur ella onnur avvarðandi, ið fara við barninum til samrøðurnar.

Løgreglan hevur frammanundan mett um málið og tikið støðu til, um grundarlag er at seta í verk rannsókn, og um neyðugt er at videoavhoyra barnið ella ungfólkið. Um so er, verður ein serútbúgvin videoavhoyrari frá løgregluni knýttur at málinum. Videoavhoyringin skal verða gjørd skjótast gjørligt og, um tað á nakran hátt ber til, minni enn eina viku eftir fráboðanina um ágang.

Tá ið málið snýr seg um eitt barn ella ungfólk yvir 14 ár, gera løgreglan, málsviðgerin í barnaverndartænastuni og Barnahúsið eina felags meting av, um tað best nøktar tørvin hjá barninum ella ungfólkinum at verða avhoyrt í Barnahúsinum ella á øðrum staði (til dømis í heiminum, í skúlanum, á viðkomandi stovni ella á løgreglustøðini). Sama hvar avhoyringin fer fram, skulu tey vera til staðar, sum hava ein umboðandi leiklut í málinum, her í millum ein tilnevndur verji fyri tann, ið er illtonktur, ein løgfrøðiligur hjásiti fyri barnið og barnaverndartænastan.

Mál, sum byrja hjá løgregluni
Løgreglan kann fáa kunnleika um, at eitt barn ella ein ungur hevur verið fyri ágangi, gjøgnum fráboðan ella gjøgnum rannsóknarvirksemi. Í slíkum førum boðar løgreglan avvarðandi barnaverndartænastu frá, og barnaverndartænastan knýtur ein málsviðgera til málið. Um løgreglan ikki metir, at grundarlag er fyri at (video)avhoyra barnið ella ungfólkið, tekur barnaverndartænastan, saman við Barnahúsinum, støðu til, hvussu málið skal handfarast, og hesir samstarvspartar kunnu velja at gera barnafakliga kanning av viðurskiftunum fyri at fáa greiðu á, um tørvur er á serligum stuðli.

Um so er, at løgreglan metir tað vera viðkomandi at videoavhoyra barnið ella ungfólkið, setir hon seg í samband við Barnahúsið og omanfyri nevnda málsviðgera, sum skal vera til staðar undir avhoyringini. Løgreglan metir harumframt, um grundarlag er fyri at biðja um eina læknakanning, og løgreglan hevur eisini ábyrgd av, at ein verji verður tilnevndur til tann, ið er undir illgruna, og at ein sakførari verður tilnevndur til barnið ella ungfólkið. Videoavhoyringar skulu gerast skjótast gjørligt og, um tað á nakran hátt ber til, minni enn eina viku eftir fráboðanina um ágang.

Fyrsta sambandið, sum løgreglan hevur við barnið ella ungfólkið, er vanliga dagin fyri sjálva videoavhoyringina, tá ið videoavhoyrarin fer á heimavitjan. Dagin eftir heimavitjanina kemur barnið ella ungfólkið til videoavhoyring í Barnahúsinum saman við foreldrum ella øðrum avvarðandi.

Mál, sum byrja í sjúkrahúsverkinum
Sjúkrahúsverkið kann varnast, at eitt barn ella ungfólk hevur verið fyri ágangi, um tað eitt nú kemur á skaðastovuna, ella um illgruni stendst um ágang, tá barnið ella tann ungi fær aðra læknaviðgerð (t.d. á Barnadeildini ella í ungdómspsykiatriini). Í slíkum førum boðar sjúkrahúsverkið avvarðandi barnaverndartænastu frá, um vissuna ella illgrunan, og barnaverndartænastan tekur (í samráði við Barnahúsið/Barnaverndarstovuna) støðu til, um Barnahúsið skal nýtast til víðari kanning, greining og greiðing av málinum.

3) Greiningar-, greiðingar- og kanningarstigið

Tá Barnahúsið hevur fingið eitt mál, verður málsgongdin fyrireikað og skipað. Málsgongdin verður lagað eftir tí einstaka málinum, og hevur eisini fyrilit fyri tí, ið er hent áðrenn Barnahúsið fekk tað um hendi. Til dømis kann tað vera, at ávís

bráðfeingis tiltøk vórðu sett í gongd, áðrenn barnið ella tann ungi varð móttikin í Barnahúsinum. Barnahúsið skal tryggja, at viðkomandi fakfólk hjá avvarðandi myndugleikum eru við í fyriskipanini av framtíðarátøkum (t.d. málsviðgerin í avvarðandi barnaverndartænastu, løgreglufólk, og lækni). Hetta verður til dømis gjørt við at halda eitt fyrireikandi samráð, ið leggur til rættis tvørfakliga samstarvið (trygdarmeting, læknakanning, videoavhoyring, kanning av tørvinum á kreppuhjálp og –viðgerð, greining og greiðing av viðgerðartørvi, har í millum støðutakan til tørv á læknafrøðiligari greining og viðgerð, sosialfakligari kanning og tiltøkum, eitt nú, um barnið skal takast úr heiminum, áseting av samveru o.l.).

Slík samráð eru kjarnan í fyriskipanarliga virkseminum hjá Barnahúsinum. Mælt verður til, at hvørt mál fevnir um eitt fyrireikandi samráð og eitt endaligt samráð, men enn fleiri samráð kunnu verða hildin eftir tørvi. Samráð kunnu skipast sum vanligir fundir, videofundir ella telefonfundir.

Tað, at Barnahúsið kann vera karmur um bæði felags vitanina um eitt mál og fyriskipanina av málinum, ger, at tað kann stuðla undir eina varliga málsgongd, ið tyngir barnið ella tann unga so lítið, sum til ber. Millum annað, tí barnið ella tann ungi sleppur frá at skula endurtaka frásagnir og viðkomandi upplýsingar ferð eftir ferð. Í sambandi við samráð, er tað eisini týdningarmikið, at Barnahúsið ger sær ómak at veita barninum ella ungfólkinum og teimum avvarðandi so nógva kunning, sum til ber.

Barnahúsið bjóðar málsviðgeranum hjá barnaverndartænastuni ráðgeving um greining og greiðing av barninum ellaungfólkinum við tí fyri eyga, at finna útav, hvønn tørv barnið hevur á hjálp, og fyri at fáa greiðu á, hvussu støðan hjá barninum ella ungfólkinum er heima við hús – í kjalarvørrinum á áganginum, og har í millum um foreldur ella avvarðandi hava tørv á stuðli.

Greiningin og greiðingin er heimilað í § 45 í barnaverndarlógini. Um nýggjar viðkomandi upplýsingar koma fram undir videoavhoyringini ella í øðrum sambandi, skulu hesar upplýsingar gerast partur av greiningini og greiðingini. Um mett verður, at barnið ella tann ungi hevur brúk fyri læknakanning, verður tað gjørt á Landssjúkrahúsinum.

Samtíðis við og sum framhald av greiningini og greiðingini ber til at bjóða kreppuhjálp og -viðgerð til nærmastu avvarðandi hjá barninum ella tí unga, um tað verður hildið hóskandi. Kreppuhjálpin í Barnahúsinum veldst um slagið av ágangi, um aldurin og búningarstigið hjá barninum ella tí unga, og um støðuna og atburðin hjá foreldrunum ella avvarðandi hjá barninum ella tí unga í kjalarvørrinum á áganginum. Royndir benda á, at kreppuhjálpin tilsamans plagar at fevna um 6-8 samrøður, ið eru býttar ímillum barnið ella ungfólkið og foreldur ella onnur avvarðandi. Talan er her um eina heildarmeting, og hvussu nógvar samrøðurnar verða, veldst sjálvsagt um ítøkiliga málið. Í nøkrum málum - eitt nú málum, ið snúgva seg um yngri børn - kunnu foreldrini hava brúk fyri fleiri samrøðum enn

barnið. Tað kann eisini vera, at spæli- ella tekniterapi verður brúkt í greiningini og viðgerðini av barninum.

Arbeiðið hjá Barnahúsinum fevnir harafturat um at veita ráðgeving um sosialnámsfrøðilig átøk og um stuðul til foreldur og onnur avvarðandi (so sum systkin) hjá barninum ella tí unga við tí fyri eyga at endurskapa trivnaðin og vanliga gerandisdagin hjá barninum ella ungfólkinum.

4) Eftirkanningarstigið

Arbeiðið hjá Barnahúsinum endar, tá ið avvarðandi myndugleikarnir hava gjørt kravdu kanningarnar, veitt neyðugu kreppuhjálpina o.a., og tá ið liðugt er at greina og greiða stuðulstørvin hjá barninum ella tí unga eftir ágangin. Stuðlandi fyriskipanir til barnið ella ungfólkið verða játtaðar sambært ásetingunum í barnaverndarlógini. Tað er barnaverndartænastan, ið hevur heimild at taka avgerð um fyriskipanir við støði í kanningunum, sum eru gjørdar í Barnahúsinum.

Eitt endaligt samráð verður hildið, áðrenn eitt mál er liðugt viðgjørt í Barnahúsinum. Samráðið eftirkannar tvørfakligu metingina av tørvunum hjá barninum ella ungfólkinum og teimum avvarðandi. Úrslitið av hesum endaliga samráðnum er ein frásøgn, ið verður løgd sum ískoyti til kanningina sambært § 45, og sum gerst grundarlag fyri framhaldandi viðgerðini av málinum (ikki í Barnahúsinum), ið barnaverndartænastan hevur ábyrgd av. Í sambandi við samanumtakandi samráðið er tað eisini sera týdningarmikið at kunna, vegleiða og – í tann mun tað ber til – at taka barnið ella ungfólkið og tey avvarðandi við í gongdina.

18. Málsgongdir í bráðfeingis málum

Í ávísum málum um ágang kann tað vera alneyðugt at seta í verk bráðfeingis tiltøk. Talan kann t.d. vera um mál, har løgreglan av rannsóknarávum metir tað vera neyðugt at gera eina læknakanning skjótast gjørligt. Í hesum førum boðar løgreglan barnaverndartænastuni og lækna frá, og kanningartíð verður avtalað. Barnaverndartænastan setur seg síðan í samband við Barnahúsið/Barnaverndarstovuna. Bráðfeingis mál kunnu eisini vera mál, har tørvur er á bráðfeingis sjúkuviðgerð ella vernd av barninum ella ungfólkinum.

Í bráðfeingis málum kann málsviðgerin hjá barnaverndartænastuni fáa ráðgeving um, hvørjar greiningar, kanningar o.a. eru neyðugar at gera alt fyri eitt, umframt ráðgeving um at fyriskipa hesi tiltøk.

Barnahúsið er ikki opið alt samdøgrið, men annars fæst samband við Barnaverndarstovu Føroya.

Í fyrstu syftu ræður um, at málsviðgerin saman við Barnahúsinum tekur støðu til, hvørji tiltøk eru bráðneyðug og eiga at verða sett í verk beinanvegin, til dømis fyri at fyribyrgja meira ágang ella at veita barninum ella ungfólkinum kreppustuðul, og hvat kann bíða, til myndugleikarnir hava sínar "vanligu" upplatingartíðir.

Harumframt kann starvsfólkið í Barnahúsinum hjálpa málsviðgeranum við at taka støðu til, hvørjir serfrøðingar skulu boðsendast beinanvegin, og kann eisini hjálpa málsviðgeranum at senda boð eftir teimum.

Harafturat ber til hjá løgregluni at fáa atgongd til videoavhoyringshølini í Barnahúsinum uttan fyri vanligu upplatingartíðirnar hjá húsinum.

19. Skrivligar mannagongdir

Starvsfólkini innan tey ymsu arbeiðsøkini skriva niður nágreinligar mannagongdir um teirra leiklut í Barnahúsinum.

Endamálið við frágreiðingunum er at tryggja og menna serkøna yrkisførleikan, ið skal eyðkenna uppgávuloysnirnar í Barnahúsinum. Samstundis eru frágreiðingarnar eitt fakligt amboð, ið skal tryggja, at Barnahúsið veitir eins dygdargóð átøk til øll børn og ung, sama hvar í landinum mál teirra byrjar.

Mannagongdirnar verða javnan dagførdar og endurskoðaðar í felag.

20. Tvørfakliga samstarvið

Myndugleikar og starvsfólk, ið arbeiða við einum ítøkiligum máli í Barnahúsinum, kunnu lata upplýsingar sínámillum um málið, sambært § 10a í Barnaverndarlógini.

Endamálið við at samstarvspartarnar lata upplýsingar sínámillum í Barnahúsinum er at verja barnið ella ungfólkið, millum annað við at sleppa tí undan at skula endurtaka frágreiðing sína um eitt nú sjálvar hendingarnar, kropsligar skaðar og aðrar upplýsingar fyri ymiskum myndugleikum.

Ein týdningarmikil partur av Barnahúsinum er sostatt, at fakfólk og myndugleikar, sum samstarva um eitt ítøkiligt mál, kunnu byggja upp eina felags vitan um málið, og at tey harvið kunnu samstarva og samskipa arbeiði sítt við tí fyri eyga, at øll viðurskifti í málinum verða kannað, og at barnið ella ungfólkið fær so vælskikkaða og heildarskipaða hjálp og viðgerð, sum til ber.

Harumframt gevur heimildin til at lata upplýsingar sínámillum eisini starvsfólkunum møguleika til at menna sínar royndir og byggja upp eitt vitanarstig og yrkisføri, ið felags ágóði fæst av.

Fyri at menna og varðveita tvørfakligu serfrøðina í málum um ágang skipar Barnahúsið fyri føstum samráðsfundum. Hesir fundir eru ikki knýttir at nøkrum ávísum máli, men hava í staðin fyri til endamáls at menna royndirnar og varpa ljós á ymiskt, ið hevur vakt ans í ávísum málum, umframt at eftirmeta og læra av málum, ið eru um at enda sína gongd í Barnahúsinum. Tey, ið taka lut í hesum fundum, eru føstu starvsfólkini í Barnahúsinum og umboð fyri ávikavist løgregluna, sjúkrahúsið og barnaverndartænasturnar.

21. Samstarvsavtalur og leiðreglur

Barnaverndarstova Føroya ger samstarvsavtalur um Barnahúsið við Føroya Landfúta og við Landssjúkrahúsið. Harafturat verða leiðreglur gjørdar fyri barnaverndartænasturnar.

Hesar samstarvsavtalur og leiðreglur skulu tryggja, at Barnahúsið virkar á einum høgum fakligum stigi, og at mál um ágang fáa somu dygdargóðu viðgerð kring alt landið.

22. Førleikamenning í Barnahúsinum

Føstu starvsfólkini í Barnahúsinum hava - umframt sína serligu útbúgving - viðkomandi royndir innan mál um ágang ímóti børnum og ungum.

Starvsfólkini luttaka javnan í førleikamenning innan økið, eins og at tey luttaka í norðurlendskum samstarvi.

23. Dátuskráseting og skjalfesting

Barnahúsið skal skráseta upplýsingar um børn og ungfólk, ið eru viðgjørd í Barnahúsinum. Hesir upplýsingar verða goymdir á Barnaverndarstovu Føroya og verða einans nýttir til hagtøl.

Almannamálaráðið ásetir nærri, hvørjir upplýsingar skulu goymast á Barnaverndarstovuni, og í hvørjum líki. Talan er um grundleggjandi upplýsingar, t.d. aldur, kyn, um kreppuhjálp er veitt, hvørjar kanningar, ið eru gjørdar o.a.

Skrásetingin er eisini partur av regluligu eftirmetingunum av virkseminum í Barnahúsinum.